**Løgfrøðilesandi til lestrarstarv í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum**

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið søkir eftir einum løgfrøðilesandi at byrja skjótast til ber at arbeiða umleið 12 tímar um vikuna.

Umsóknarfreistin er 27/2-2024

**Um starvið**
Ynskir tú at menna teg løgfrøðiliga innan fyrisitingarrætt, fiskiveiðirætt og onnur rættarøkir, sum hoyra til Ráðið, meðan tú lesur, er hetta starvið nakað fyri teg.

Tú kemur í høvuðsheitum at arbeiða við lættari løgfrøðiligum uppgávum innan málsøkið hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum. Uppgávurnar eru m.a. at luttaka í:

- Lógar- og kunngerðarsmíð
- Løgfrøðilig ráðgeving, innanhýsis og til stovnar undir Ráðnum
- Málsviðgerð sum t.d. kærur og innlitsumbønir

**Tínir førleikar**
Vit vænta, at tú:

- Ert løgfrøðilesandi
- Ert fakliga væl fyri, arbeiðir skipað og við nærlagni, og kann arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at orða teg og samskifta bæði í skrift og talu og hevur góðar telduførleikar
- Ert fyrikomandi, fleksibul og hevur góð samstarvsevnir

**Vit bjóða**
Starvið er mennandi við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum, sum tú loysir við vegleiðing frá løgfrøðingi í Ráðnum og eftir tørvi eisini í tøttum samstarvi við aðrar starvsfelagar í Ráðnum. Vit leggja dent á tína fakligu menning og trivnað.

**Setanartreytir**
Starvið er tímalønt, og vit vænta, at tú kanst arbeiða í miðal umleið 12 tímar um vikuna, tó kann avtalast at arbeiða meira ella minni í tíðum, um tørvur er á tí.
Lønin er eftir sáttmála við Starvsfelagið ella Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

**Samband**
Hevur starvið tín áhuga, send okkum eina umsókn við lívsrensli og avriti av prógvum til starv@fisk.fo í seinasta lagi 27/2-2024.

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Betzy Ludvig, løgfrøðing, tlf. 267703/betzy.ludvig@fisk.fo.

Vit gleða okkum at frætta frá tær.


**FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 / FO-100 Tórshavn / Føroyar
Tel. +298 353030 / fisk@fisk.fo / www.fisk.fo


---

**Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið er eitt av níggju stjórnarráðum í landsfyrisitingini, ið veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Her starvast 15 starvsfólk, sum umsita fiskivinnumál, fiskiveiðieftirlit, fiskirannsóknir og – gransking, inntøkutrygd fiskimanna, hvalamál, bjarging, trygd, veðurtænastu, busskoyring, farmakoyring, ferjulegur, ferjur, ferðslumál, landshavnir, landsvegir, tyrlupallar og ráðgeva viðvíkjandi flogvøllum.**